gult cyan magenta svart



## TIT SPYRJA VIT SVARA














*Bergur Hanusson, djóralækni* · *Heri Joensen, prestur* · *Heri Kragesteen, sálarfrøðingur* · *Ingi Højgaard, løgfrøðingur* · *Jens Andreassen, lækni* · *Jóhanna á Tjaldrafløtti, føðslu/húsarhaldsfrøðingur* · *Jón Klein Olsen, politistur* · *Jón Kragesteen. Ferðslutrygd* · *Julianna Næs, pedagogur* · *Sjúrður Johannesen, sosialráðgevi* · *Turid Thomsen, lestrarvegleiðari* · *Marius Staksberg, málfrøðingur*

FERÐSLUTRYGD

### Gonguteigar vanta

Hvussu ber tað til, at eingin gonguteigur er til skúlabørnini, sum skulu tvørtur um landavegin at taka bussin, sum koyrir út móti Havnardali?

*Hesin spurningur er eisini beindur til teknisku deild hjá Tórshavnar Býráð. Svarið er, at ásannað verður, at tað er sera óheppið at gonguteigar vanta á Landavegnum – í Kinabrekkuni – og eisini í Mattalág. Vónandi verður trupulleikin loystur, um ætlanin við at gera rundkoyring her verður framd. Fyribils er eitt skitsuprojekt í gerð.*

### Frælsið ótrygt

Nær hendir ein vanlukka í ferðsluni uttan fyri Venjingarskúlan? Eg spyrji, tí eg beri ótta fyri henni, nú alt er í einum eljuroki, tá børnini fara í skúla á morgni – bilar og børn hvørt um annað. Hetta kann ikki halda fram leingi aftrat uttan at onkur vanlukka hendir. Hvat ger Ráðið fyri Ferðslutrygd fyri at loysa henda trupulleika?

*Nær ein ferðsluvanlukka hendir, ber ikki til at siga. Hinvegin mugu vit ásanna, at ferðsluviðurskiftini á Frælsinum við Venjingarskúlan eru ikki góð, um vit hugsa um tey, sum skulu yvir um vegin. Nógvir eru bilarnir, sum koyra eftir hesum vegi, og av tí at hann er beinur og sléttur, hava bilførarar lyndi til at koyra skjótari enn væl er. Frælsið er sambindingarvegur millum býarpartar og tí koyra her nógvir bilar, sum einans vilja sleppa ígjøgnum, og tað skjótast til ber. Umframt at fleiri skúlar eru í økinum, er eisini ein nógv vitjað bensinstøð. So tað sigur seg sjálvt, at foreldur kenna ótta á sær, tá ið børn teirra skulu krossa vegin. Tað ber sjálvsagt til at gera broytingar í vegnum, soleiðis at annaðhvørt verða børnini, tey "bleytu vegafarandi" og bilarnir skildir at, ella kann so verða skipað fyri, at bilarnir ikki koyra skjótari enn t.d. 30 km/t. á teimum støðum, har mest sannlíkt er, at børnini fara yvir um vegin. Hvussu hetta kann verða gjørt, skal ikki verða komið inn á her.*

*Upp á spurningin, hvat Ferðslutrygd ger fyri at loysa trupulleikan skal verða svarað, at vanliga fer Ferðslutrygd ikki inn í serstøk mál, men arbeiðir meira generelt.*

*Spurningurin er eisini settur Býráðnum og svarið er, at tað er sera óheppið at "bleyt vegfarandi" verða blandað saman við ferðslu, men hetta er ikki bara eindømi við Venjingarskúlan. Spurningurin verður lagdur fyri ferðslunevndina í næstum.*

### Spyrjið serfrøðingarnar

Hava tit spurningar til serfrøðingarnar, kunnu tit senda teir til:

**Sosialin**
postsmogu 76
110 Tórshavn

ella á fax: 314720
og teldupostadressuna:
spyr@sosialurin.fo

# 330 bíða eftir grundstykki í Havn

**– Vit mugu út á privata marknaðin og heita á byggifeløgini um at koma við alternativum loysnum, tí vit noyðast at ásanna, at kommunan ikki einsamøll megnar at ganga øllum á møti sum ynskja eina bústaðarloysn, sigur Jan Christiansen, býráðsformaður í Havn**

BÚSTAÐARTROT
*Turið Kjølbro*



*– Við tí vøkstri sum er í høvuðsstaðnum í løtuni verður um fá ár trupult at finna øki til útstykkingar. Bústaðarmynstrið má tí broytast, sigur Jan Christiansen, býráðsformaður í Havn.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Rættiligur gravgangur er eftir grundstykkjum í Tórshavnar kommunu. Í dag bíða 330 fólk eftir grundøki og hvønn dag koma nýggir umsøkjarar á listan. Útstykkingarnar í Hoyvíkshaganum fara skjótt í gongd, og umframt tað hava fleiri byggifeløg ætlanir um at fara undir størri sethúsabygging.

Í Hoyvíkshaganum verður talan um 170 nýggj grundøki. Fólk kunnu velja ímillum 300, 400 og 500 fermetrar stór stykki. Íroknað eru eisini randarhús, sum verða bygd eftir sama leisti sum Millum Gilja og Inni á Gøtu.

– Upplendið rundan um Havnina er ikki óavmarkað. Tí mugu vit gera smærri grundøki eisini. Fólk ynskja ymiskar búloysnir, og tey, sum ynskja tað, skulu hava møguleikan at keypa eitt minni grundøki. Hyggja vit í miðbýin í Havn eru nógv smærri hús bygd á smá stykki. Í dag hava vit nakrar ásetingar sum eitt nú siga, at tú skalt halda teg 2,5 metrar frá mark, tá ið tú byggir. Á teim smæstu grundøkjunum í nýggju útstykkingini er ætlanin, at byggjast skal heilt út til veglinju og til mark hjá grannanum øðrumegin, sigur Jan Christiansen, býráðsformaður í Havn.

### Bústaðarmynstrið broytast

Við tí vøkstri sum er í høvuðsstaðnum í løtuni verður um fá ár trupult at finna øki til útstykkingar. Bústaðarmynstrið má tí broytast, heldur býráðsformaðurin. Hann ásannar eisini, at kommunan einsamøll megnar ikki at ganga øllum á møti sum ynskja eina bústaðarloysn.

– Vit mugu út á privata marknaðin og heita á byggifeløgini um at koma við alternativum loysnum. Tað veri seg samanbygd hús, íbúðarblokkar, tvíhús ella annað. Á Berjabrekku verða nógv hús bygd afturat og ein onnur útstykking afturat verður í Hoyvíkshaganum, sigur Jan Christiansen.

Her sipar hann til byggifelagið Guttesen & Staksberg, ið ætlar at stykkja út við Løgmannabreyt. Talan verður um eini 100 bústaðareindir eftir nøkulunda sama leisti sum húsini á Berjabrekku.

– Byggifeløgini banka uppá nú og vilja sleppa í gongd, og vit kunnu ikki annað enn taka væl ímóti. Einasta kommunan skal gera er at lata lendi og góðkenna byggiætlanina.

### Arbeiðið bjóðast út

Tíðarætlanin yvir útstykkingarnar í Hoyvíkshaganum sigur, at ráskitsan yvir, hvussu økið skal síggja út, skal verða liðug 1. mars. Miðskeiðis í apríl verða grundstykkini lutað út. Høvuðsverkætlanin skal verða liðug í juli mánaði. Eigarafelag skal setast á stovn um sama mundið, og síðani verður arbeiðið boðið út seinast í juli mánaði. Tá yvirtekur eigarafelagið arbeiðið. Miðskeiðis í august byrjar arbeiðið.

– Tíðarætlanin er kanska nakað bjartskygd, men í heyst skuldi arbeiðið verið byrjað, sigur Jan Christiansen.

Býráðsformaðurin roknar við, at grundstykkjaprísurin fer at liggja um slakar 300.000 krónur fyri eitt øki á 500 fermetrar.

Stóra tilgongdin til høvuðsstaðin trýstir ikki bert á bústaðarmarknaðin. Bíðilistin eftir dagstovnaplássi veksur tilsvarandi, og skúlarnir í høvuðsstaðnum eru um at verða fyltir nú. Í útstykkingini í Hoyvíkshaganum skulu dagstovnur og skúli byggjast, og Jan Christiansen roknar við, at um ikki so langa tíð verður farið undir at gera ein barnaskúla.

– Okkum dámar sjálvsagt væl at kommunan veksur og hevur tað gott, men risastóri vøksturin, sum er í løtuni, leggur eitt ógvuliga stórt trýst á kommununa.



*Nýggjasta ráskitsan yvir útstykkingarnar í Hoyvíkshaganum*

gult cyan magenta svart



# Fólkaatkvøða og olja á skránni í Fólkatinginum

**Føroyar eru á skránni bæði í dag og í morgin í Fólkatinginum, har Poul Nyrup Rasmussen skal greiða frá um undirgrundaravtaluna og nýggjastu útmeldingina úr Føroyum um at avlýsa fólkaatkvøðuna.**

SAMRÁÐ
*Magnus Dam, Keypmannahavn*



Meira enn 1000 síður við skjølum, frágreiðingum og metingum um undirgrundaravtaluna frá 1992 skulu í dag og í morgin viðgerast í Fólkatinginum.

Forsætisráðharrin skal í dag svara einari røð av spurningum frá Peter Skaraup úr Danska Fólkaflokkinum, og í morgin skal Nyrup á fund við Føroyanevndina og Politiskt-Búskaparligu nevndina um undirgrundaravtaluna og ætlanina hjá løgmani at avlýsa fólkaatkvøðuna í mai.

Peter Skaarup hevur millum annað spurt forsætisráðharran, um tað ikki er so, at allur tann danski staturin eigur oljuna og gassið, sum møguliga er í undirgrundini undir danska ríkinum, sum hann málber seg. Hann spyr eisini, um avtalur, har hetta ikki ger seg galdandi, eru ógyldugar. Hesin spurningurin er settur á skránna fyri fundin í dag, og har skal forsætisráðharrin greiða frá, um hann er samdur ella ósamdur við hesum sjónarmiðunum.

Peter Skaarup hevur eisini sett forsætisráðharranum eina rúgvu av øðrum spurningum um undirgrundaravtaluna, og um møguleiki er fyri at broyta hana, og hesir verða helst svaraðir í næstu viku.

### Samráð í tveimum nevndum

Tað er nógva skrivingin seinastu vikurnar, sum hevur fingið limir í Fólkatinginum at seta spurnartekin við undirgrundaravtaluna. Hesar seinastu dagarnar hava embætisfólk leita í skjalagoymslunum hjá donsku ráðharraskrivstovunum, og meira enn 1000 síður eru býttar út til limir í Politiskt-Búskaparligu nevndini og tí serligu Føroya-nevndini.

Tær báðar nevndirnar fara í morgin at sláa seg saman í eina, og klokkan 9.30 kemur forsætisráðharrin at greiða frá innihaldinum í teimum mongu skjølunum og støðuni annars hjá donsku stjórnini til undirgrundaravtaluna.

Tað eru serliga teir smærru flokkarnir í Fólkatinginum, sum seta spurnartekin við avtaluna, meðan teir stóru flokkarnir ikki halda, at stjórnin kann nerta við avtaluna, nú meira enn átta ár eru liðin, síðani hon varð undirskrivað.

Hvørja støðu stjórnin hevur, fæst at vita eftir samráðið í morgin.

### Frágreiðing um fólkaatkvøðuna

Tað er kortini ikki bara olja, sum verður á skránni í morgin. Nú løgmaður hevur boðað frá, at hann ikki tekur undir við at halda eina fólkaatkvøðu 26. mai, so vilja fólkatingslimirnir eisini hava eina frágreiðing um hetta.

Fleiri teirra hava kallað avgerðina hjá løgmanni fyri eina klóka avgerð, men forsætisráðharrin vil ikki enn gera viðmerkingar til útspælið hjá løgmanni. Á tíðindafundi í gjár segði Nyrup, at tað ikki er hansara uppgáva at geva løgmanni karakter, men hann staðfesti, at vit nú enn einaferð hava eina nýggja støðu. Hesa støðuna hevur Føroya-nevndin biðið um eina frágreiðing um, og hana skal Nyrup koma við í samráðnum í morgin.

## Gólvuppboðssølan

**Knappliga 11 tons vórðu seld á gólvsøluni hjá Fiskamarknaðinum mánadagin, og høvdu í alt 15 bátar landað hesa nøgd**

| Syslu–nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| FD 79 | HAVØRNIN | SNELLA | 76 |
| FD 101 | STRANDINGUR | LÍNA | 69 |
| FD 492 | KLETTUR | LÍNA | 281 |
| TG 300 | LÍÐARBRØÐUR V/H. JOENSEN | SNELLA | 3.546 |
| TG 349 | TRÝ DRANGUR | SNELLA | 512 |
| TG 628 | ALIS T | LÍNA | 4 |
| TG 670 | VÍKABERG | SNELLA | 850 |
| TN 483 | ÆGIR | LÍNA | 4.134 |
| TN 485 | SNÆVAL–HEYGGUR | LÍNA | 152 |
| VA 132 | LÍV | SNELLA | 58 |
| VA 164 | NIKLÁI | SNELLA | 115 |
| VA 28 | ÁLITIÐ | SNELLA | 180 |
| VA 324 | SKARVUR | SNELLA | 172 |
| VN 405 | KRABBIN | SNELLA | 300 |
| VN 408 | JÓNVØR | SNELLA | 507 |

## Dáma ikki sjólívið

**Skotski fiskiflotin stendur fyri eini nýggjari avbjóðing. Fyrst og fremst hava teir sama trupulleikan at dragast við sum allar aðrar fiskivinnutjóðir, nevniliga ov lítlar kvotur, men nú eru manningartrupulleikarnir við at vaksa upp um oyri.**

Skotar tíma ikki at sigla longur og hetta kemst av at framtíðin er ikki trygg hjá fiskimonnum. Óvissan stavar fyrst og fremst av, at tað er ikki longur lætt av vera fiskimaður, tí skrivstovuveldi hevur tikið yvir, kvoturnar verða minkaðar og leiðir verða stongdar. skrivar norska netsíðan Intrafish.

Fyrr hevur tað verið soleiðis, at sonur hevur fylgt pápa í yrkinum, men hetta er broytt og nú er tað oljuvinnan sum lokkar. Tá skeið fyri fiskimenn vóru hildin fyrr í ár var tað ongin sum teknaði seg úr teimum báðum týdningarmiklastu fiskihavnunum í Skotland, Peterhead og Fraserburg.

Trupulleikin er so stórur í Skotlandi, at bátar og skip liggja tí teir einki fólk hava.

# Løgmaður hevur borið seg klókt at

**– Men skulu vit vera við, skal nýggj samgonga skipast. tað frægasta hevði verið at havt nýval til Løgtingið, sigur Jóannes Eidesgaard, formaður javnaðarfloksins**

FULLVELDI

*Áki Bertholdsen*

–Tað er einki at ivast í, at tað, sum løgmaður nú hevur gjørt, minkar um hansara trúvirði. Men kortini haldi eg, at hann hevur tikið eitt klókt stig.

Jóannes Eidesgaard, formaður javnaðarfloksins, staðfestir, at tað er hend ein øgilig broyting í fullveldistilgongdini hjá landsstýrinum.

Men hann fegnast um, at fólkaflokkurin hevur lagt á annan bógv og hevur ásannað, at tann breiða semjan, hann hevur sóknast eftir, ikki kundi finnast innanfyri teir karmar, sum upprunaliga vórðu lagdir fyri fullveldistilgongdini.

– Tí er tað onki at ivast í, at tað, sum fólkaflokkurin nú hevur lagt fram, liggur munandi nærri tí, sum ein stórur meiriluti av Føroya fólki kann taka undir við.

Hann sigur, at uppskotið, sum fólkaflokkurin nú hevur lagt fram, líkist rættiliga nógv uppskotinum hjá javnaðarflokkinum um, hvussu viðurskiftini ímillum Føroyar og Danmark skulu skipast. Sjálvt uppskotið hjá fólkaflokkinum hava vit prentað aðrastaðni í blaðnum.

–Tey fýra fyrstu punktini í uppskotinum hjá fólkaflokkinum, fær javnaðarflokkurin ongar trupulleikar við at góðkenna. Tey eru púra í samsvar við okkara sjálvstýrislóg.

–Tað fimta punktið, um at minkað blokkin niður í onki eftir eini skipaðari ætlan, eru vit ikki heilt samd í. Vit halda ikki, at veitingin skal fella burtur eftir einum ávísum áramáli. Vit halda, at tað er rættast at minka blokkin úr Danmark so hvørt føroyski búskapurin veksur.

Hinvegin heldur formaður javnaðarfloksins, at yvirtøkurnar, sum fólkaflokkurin nevnir í punkti seks, eru ein spurningur um politiska raðfesting, sum eigur at verða nærri viðgjørd.

–Búskapargrunnin taka vit undir við. Men vit halda kortini ikki, at hetta er eitt mál, sum skal viðgerast í hesum samanhagninum, tí tað er eitt føroyskt mál burturav.

### Yvirvaldsrættur ongin trupulleiki

Eitt, sum tjóðveldisflokkurin serliga heftir seg við í nýggja uppskotinum hjá fólkaflokkinum, er, at eftir tí skal danskur yvirvaldsrættur í Føroyum góðkennast. Men tað voldir ikki javnaðarflokkinum trupulleikar

– Nú veldst um, hvussu veruleikakent, ella veruleikafjart, vit uppfata hugtakið yvirvaldsrættur. Hjá javnaðarflokkinum er ongin ivi um, at vit eru í danska ríkinum. Eftir okkara tykki hevur ríkisfelagsskapurin eitt innihald, tvs, at tað eru summi málsøki, sum hoyra ríkinum til og sum verða umsitin av ríkisfelagsskapinum. Tað eru hesi málini, ið Løgmaður í sínum uppskoti nevnir mál, "ið eru tengd at yvirvaldsrætti ríkisins".

– Tí síggja vit ongan trupulleika at góðkenna danskan yvirvaldsrætt í Føroyum á summum økjum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Jóannes Eidesgaard nevnir undirgrundina sum eitt dømi.

– Vit hava fingið lóggávuvaldið og umsitingarvald yvir undirgrundini. Men sjálvan yvirvaldsrættin hava vit ikki fingið.

Men Jóannes Eidesgaard leggur framvegis dent á, at Javnaðarflokkurin fer ikki at vera stuðulsflokkur hjá samgonguni í hesum málinum.

– Skulu vit taka lut í arbeiðnum at umskipa viðurskiftini ímillum Føroyar og Danmark, skulu vit hava eina nýggja samgongu, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann sigur, at tað ruddligasta hevði verið at havt eitt løgtingsval, so at veljarin fekk høvi at siga sina hugsan. Ikki minst nú, løgtingsval skal vera um eitt ár kortini. Hinvegin er tað til stóran skaða, at málið um viðurskiftini ímillum Føroyar og Danmark ikki verður loyst, tí sum er, tekur tað allar politiskar kreftir, so at øll onnur mál liggja á láni. Í so máta hevði tað verið at fegnast um, at hetta málið fekk eina skjóta loysn nú. Men í øllum førum skal nýggj samgonga skipast, sigur Jóannes Eidesgaard.

## Vestlax víðkar á Hellunum



**Vestlax og harvið eisini PanFish ger í løtuni útbyggingar á smoltstøðini við Laksá í Oyndarfirði.**

Hendan støðin kann í dag virka umleiðs tvær milliónir smolt árliga og ætlanin er at økja hetta til fimm milliónir árliga

Ein nýggj stór høll verður bygd í løtuni og hendan skal tryggja Vestlaks smolt í framtíðini. Panfish er størsti útlendski eigarin í Vestlaks samtakinum. Vestlaks er í dag største alifyritøka í landinum og hon veksur skjótt.

*je*